# Tøkk



Hjartaliga takka vit tí stóra skara, ið hendan góðveðursdag í adventini fylgdi kæra manni mínum og góða pápa, verpápa, abba og langabba okkara

**Torstein Christiansen**

sum eftir eina langa sjúkralegu stillisliga legði árarnar inn eftir ein langan og strævnan arbeiðsdag, ið var at enda komin.

Tøkk til Jákup Reinert, prest, fyri góð orð í kirkjuni og tær avbera vøkru røddir frá sangarunum. Takk til gravarar, klokkara, tey ið komu við køkum, fyri blómur og kransar og vitjan á ymiskan hátt.

Tøkk til tykkum á Áargarði, at tit vóru góð við hann ta tíðina hann var hjá tykkum. Elisabeth og aðrar, sum gjørdu til ervið niðri á Keldu. Ein serlig tøkk til allar abbasynirnar, sum stóðu við kistuna, meðan sungið varð »Gleðilig jól«, áðrenn teir bóru hana út. Ein jólafriður fylti kirkjuna hesa løtuna.

Tøkk øll somul.
*Gleðilig jól og Harrans signing í komandi ári.*

*Familjunnar vegna*
**Sunbjørg, Linjohn, Birthe og Agnas við familjum**

*»Eg veit væl, at eina tín frelsarahond kann føra um havið mítt far til vitarnir lýsa á kendari strond og havnina eyga mítt sær«*

# Tøkk



Hjartaliga takka vit øllum, sum á einhvønn hátt sýndu samkenslu, tá kæri maður mín, pápi, verpápi, abbi, beiggi, versonur og svágur okkara

**Hans Jørgen Johannes Dam**
Sandavágur

so brádliga andaðist í Miami í Florida og varð jarðaður.

Tøkk fyri sms og telefonheilsanir meðan vit vóru uttanlands og til øll tykkum, sum tóku ímóti okkum, tá ið vit lendu í Vágum.
Tøkk til familju, vinir og øll tykkum, sum stukku inn á gólvið, ringdu og vóru so hjartaliga um okkum og hjálptu so væl til við jarðarferðini.

Tøkk til Ingu Poulsen Dam og Theodor Eli Dam Olsen, prestar, berara, sangarar, kirkjutænarar, tit ið bakaðu og til tykkum, sum stóðu fyri ervinum.
Tøkk fyri gávur, heilsanir, blómur, kransar, peningagávur til Føroysku Sjómanskirkjuna og minningarorð.
Tøkk til tykkum mongu, ið fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Gleðilig jól og gott Nýggjár!*

*Familjunnar vegna*
**Nancy,**
**Terje, Erhard og Katrin**

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at okkara elskaða kona, mamma og omma

**Jytte Mikkelsen**
fødd Jensen
ættað úr Kollafirði
búsitandi í Canada

andaðist 15. desember, 78 ára gomul.

*Familjunnar vegna*
**Anfinn Mikkelsen**

# Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, ið sýndu samkenslu, tá ið kæra kona, mamma, vermamma og omma okkara

**Hanna Højbro**

andaðist og varð jarðað.

Tøkk til tykkum øll, sum á ymiskan hátt hjálptu til við jarðarferðina og ervið í kirkjukjallaranum.
Tøkk til Hanus, prest, fyri góð og troystarrík orð.
Eina hjartans tøkk fáa tit á deild M á Klaksvíkar Sjúkrahúsi fyri góða umsorgan og hjálp, meðan hon var har sína síðstu tíð.
Hjartans tøkk fyri blómur, kransar og heilsanir, ið tit sendu okkum.

*Vit fara við hjartans tøkk at ynskja øllum eini gleðilig jól og eitt eydnuberandi nýggjár.*

*Vegna tey avvarðandi*
**Bjarti, Jógvan, Jóan Magnus og Eyðun**



# Tøkk

Hjartaliga takki eg øllum tykkum, sum mintust til mín á mínum 65 ára føðingardegi.

**Heilsan**
**Trygvi Midjord**



# Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum við heilsanum, gávum og á annan hátt gleddu okkum á gullbrúdleypsdegnum tann 8. november 2009.
Eisini vilja vit nýta høvið at ynskja øllum eini góð og hugnalig jól og eitt av Harranum signað nýggjár.

**Heilsan**
**Herborg og Hildibjart Johansen**

# Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum á ymsan hátt sýndu samkenslu, tá okkara kæra kona, mamma, vermamma, omma og langomma

**Karolina Müller**
Kvívík

andaðist og varð jarðað.

Tøkk til Ingu Dam, prest, fyri troystarrík orð, tøkk til kirkjutænarar, sangarar og fyri hjálp og stuðul til jarðarferðina og ervið.
Tøkk til tykkum mongu, sum mintust hana við blómum, kransum og gávum.
Tøkk til starvsfólkið á Mørkini.
Tøkk til tykkum mongu, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

*Samstundis verður ynskt tykkum øllum eini gleðilig jól og gott nýggjár.*

*Familjunnar vegna*
**Hans**